NORÐOYA SPARIKASSI

# ÁRSFRÁSØGN 2005



NORÐOYA SPARIKASSI

ÁRSFRÁSØGN 2005

# UM SPARIKASSAN

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-700 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Leirvík
FO-520 Leirvík
Tel. 475100
Fax 476010

**Sparikassin**
er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peninga-ogn ella avlopi sparikassans.

**Avlop sparikassans**
verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

**Í sparikassanum**
eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

# INNIHALDSYVIRLIT

| | |
|---|---|
| Lykla- og høvuðstøl | 7 |
| Ársfrágreiðing | 8 |
| Átekningar til ársfrásøgnina | 11 |
| Rakstrarroknskapur | 12 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 13 |
| Kapitalflytingar og solvensuppgerð | 14 |
| Peningastreymsroknskapur | 15 |
| Viðmerkingar | 16 |
| Nýttur roknskaparháttur | 22 |

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 32,5 | 30,1 | 29,2 | 29,6 | 25,5 |
| Kjarnukapitalprosent | 32,5 | 30,1 | 29,2 | 29,6 | 25,5 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 12,5 | 12,7 | 9,3 | 8,7 | 10,6 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 10,3 | 10,0 | 7,5 | 6,8 | 8,5 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,8 | 1,8 | 1,6 | 1,6 | 1,9 |
| Rentuváði | 2,2 | 2,6 | 1,6 | 1,0 | 1,8 |
| Gjaldoyrastøða | 0,5 | 0,2 | 0,2 | 0,1 | 0,2 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 86,5 | 93,9 | 99,5 | 107,6 | 92,9 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 279,9 | 227,7 | 158,6 | 106,9 | 156,8 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 29,6 | 33,5 | 43,1 | 17,6 | 35,9 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,1 | 0,0 | 0,1 | 0,4 | 0,0 |
| Burturleggingarprosent | 3,9 | 3,9 | 3,2 | 3,2 | 1,9 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,6 | 0,6 | 0,5 | 0,3 | -0,0 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 10,1 | 14,0 | 12,0 | 9,2 | 14,4 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,4 | 3,5 | 3,7 | 3,7 | 3,9 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 51.551 | 55.816 | 57.464 | 58.197 | 60.155 |
| Virðisjavnan | 2.250 | 3.125 | -1.282 | -471 | -686 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | 267 | -40 | 499 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.236 | 2.841 | 532 | 672 | 827 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | 55.037 | 61.782 | 56.981 | 58.358 | 60.795 |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 25.682 | 28.706 | 29.417 | 32.705 | 32.016 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 1.056 | 940 | 1.115 | 1.069 | 981 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 4.159 | 4.967 | 4.654 | 2.684 | -858 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | 24.140 | 27.169 | 21.795 | 21.900 | 28.656 |
| Skattur | 4.298 | 5.832 | 4.333 | 4.753 | 5.650 |
| **Ársúrslit** | 19.842 | 21.337 | 17.462 | 17.147 | 23.006 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 696.577 | 793.904 | 888.997 | 970.605 | 1.110.576 |
| Lánsbrøv | 263.529 | 244.126 | 174.049 | 156.101 | 155.950 |
| Innlán | 836.654 | 879.845 | 924.263 | 932.098 | 1.219.133 |
| Javni | 1.053.574 | 1.114.922 | 1.177.590 | 1.202.537 | 1.513.846 |
| Eginpeningur | 202.843 | 224.305 | 242.426 | 259.576 | 282.647 |

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Ársúrslitið

Árið 2005 gjørdist gott hjá Norðoya Sparikassa. Ársroknskapurin vísir eitt avlop áðrenn skatt uppá 29 mió.kr. móti 22 mió.kr. í 2004. Eftir skatt, gjørdist ársúrslitið 23 mió.kr. ímóti 17 mió.kr. í 2004. Havandi í huga avmarkaða búskaparvøksturin, er sparikassin nøgdur við úrslitið.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar gjørdust 1,5 mió.kr. hægri í 2005 enn árið fyri. Vøksturin kemur í stóran mun frá øktum útlánsvirksemi.

Netto rentu og kostnaðarinntøkurnar vóru 60,2 mió.kr. í 2005 ímóti 58,2 mió.kr. í 2004, ein vøkstur uppá 2 mió.kr., svarandi til 3,4 %.

Sparikassin hevði í  2005 eitt tap av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra uppá 0,7 mió.kr., hetta er á leið tað sama sum í 2004, tá ið tap av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra var  0,5 mió.kr.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur vóru 31,7 mió.kr. í 2005 ímóti 29,8 mió.kr. í 2004. Ein vøkstur uppá 1,9 mió.kr., svarandi til 6,4 %. Hesin vøkstur stavar í høvuðsheitinum frá arbeiði við at menna sparikassan til framtíðina og tær avbjóðingar sum liggja í at víðka um virksemið sparikassans.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum eru í 2005 1 mió.kr., ið er umleið tað sama sum í 2004.

Aðrar vanligar útreiðslur vóru 0,3 mió.kr. í 2005, móti 2,9 mió.kr. í 2004. Hetta viðførir eina nettoávirkan uppá 2,6 mió.kr. samanborið við 2004.

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá útlán eru -0,9 mió.kr. í 2005 móti  2,7 mió.kr. í 2004. Og hetta viðførir eina nettoávirkan uppá 3,5 mió.kr. samanborið við 2004.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið hjá Norðoya Sparikassa er gott. Við árslok 2005 var gjaldførið 337 mió.kr. Gjaldførið er hækkað við 136 mió.kr. Orsøkin til hettar er, at innlán sparikassans í 2005 eru vaksin skjótari enn útlánini. Gjaldførið við árslok var 71% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans 26%. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans fall við 4,1%, frá 29,6% við árslok 2004 til 25,5% við árslok 2005. Lógin krevur 8 %.

## Fíggjarstøðan

Útlán sparikassans vóru við árslok 2005 1.111 mió.kr. og eru tey í árinum vaksin við 14,2%.

Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 30,8 % og er nú 1.219 mió.kr.

Fíggjarstøða sparikassans vaks við 311 mió.kr. og javnvigar við 1.514 mió.kr. við árslok 2005. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 25,9 %.

Eginogn sparikassans er nú 283 mió.kr. Sparikassin hevði í 2005 eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 10,6 % móti 8,7 % í 2004.

## Býti av ársúrsliti

Nevndin skjýtur upp, at av ársúrslitinum 23 mió.kr. saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum 255 mió.kr. og gávugrunninum 1 mió.kr., ella íalt 279 mió. kr, verða lagdar 1 mió.kr. í gávugrunnin og 278 mió. kr. verða fluttar til næsta ár.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið í sparikassanum var við árslok 33,7 umroknað til fulla tíð, ímóti 33,0 fólkum í 2004. Ein hækking upp á 0,7 ársverk.

## Framtíðin

Eftir at roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa er avgreiddur, eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningin, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarligu støðu sparikassans.

Kappingin millum føroysku peningastovnarnar um sethúsakundarnar, hevði við sær, at Norðoya Sparikassi í desember í fjør kom við nýggja Heimláninum, har rentan er 3,45% upp til 80% av sethúsavirðinum. Hetta kemur sjálvsagt at síggjast aftur í roknskapinum fyri komandi ár. Annars verður 2006 sermerkt fyri Norðoya Sparikassa, á tann hátt, at nýggjar deildir verða lætnar upp bæði í Tórshavn og í Runavík, og væntar sparikassin økt virksemi í hesum økjum.

Við hesum í huga, vænta vit, at úrslitið verður á leið tað sama sum undanfarna ár.


Carlsberg

# ÁTEKNINGAR TIL ÁRSFRÁSØGNINA

Nevnd og stjórn Norðoya Sparikassa hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2005, ið vit viðmæla aðalfundinum at góðkenna. Klaksvík, hin 23. februar 2006

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

Óli Marnar Christiansen
*formaður*

Finn Kjølbro
*næstformaður*

Jógvan Joensen

Álvur Klakk

Páll Klettskarð

Erling Petersen

Sigrun Heimistovu

Elmar Poulsen

## Umboðsráðsvaldu grannskoðararnir

Vit hava grannskoðað ta av leiðsluni gjørdu ársfrásøgn 2005 fyri Norðoya Sparikassa

## Grannskoðaraátekning

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2005. Ársfrásøgnin er í samsvar við lógarinnar krøv um roknskaparframløgu.

Leiðsla sparikassans hevur ábyrgdina av ársfrásøgnini. Ábyrgd okkara er at lýsa okkara niðurstøðu um ársfrásøgnina.

## Framda grannskoðanin

Vit hava framt okkara grannskoðan í samsvar við alment galdandi grannskoðarareglur. Hesar reglur krevja, at vit leggja til rættis og fremja grannskoðanina við atliti til, at fáa eina grundaða sannføring um, at ársfrásøgnin ikki inniheldur týðandi feilir. Grannskoðanin hevur umfatað stakroyndir av teimum upplýsingum, sum upphæddir og upplýsingar í ársfrásøgnini byggja á. Grannskoðanin umfatar eisini støðutakan til roknskaparhátt og roknskaparligar metingar, ið leiðslan hevur nýtt, umframt meting av ársfrásøgnini sum heild. Tað er okkara fatan, at framda grannskoðanin gevur nøktandi grundarlag fyri niðurstøðu okkara.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2005, umframt úrsliti av sparikassans virksemi fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2005, og at ársfrásøgnin er í samsvar við lógarinnar krøv til roknskaparframløgu.

Nykøbing Mors, hin 23. februar 2006

Tórshavn, hin 23. februar 2006

Jens Peter Egebjerg Hansen
*løggildur grannskoðari*

Símun Absalonsen
*løggildur grannskoðari*

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 72.787 | 68.803 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 16.895 | 14.488 |
| | Netto rentuinntøkur | 55.892 | 54.315 |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 42 | 90 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 4.372 | 3.971 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 151 | 179 |
| | Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 60.155 | 58.197 |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -686 | -471 |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 827 | 672 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 31.743 | 29.834 |
| 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 981 | 1.069 |
| 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 273 | 2.871 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | -858 | 2.684 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 499 | -40 |
| | Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt | 28.656 | 21.900 |
| | | | |
| 23 | Skattur | 5.650 | 4.753 |
| | Ársúrslit | 23.006 | 17.147 |
| | | | |
| | Býti av rakstrarúrsliti | | |
| | Ársúrslit | 23.006 | 17.147 |
| | Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 3.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 254.972 | 235.825 |
| | Til taks tilsamans | 278.978 | 255.972 |
| | | | |
| | Lagt í gávugrunn | 1.000 | 1.000 |
| | At flyta til næsta ár | 277.978 | 254.972 |
| | Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks | 278.978 | 255.972 |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 31.663 | 11.255 |
| 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 168.983 | 33.213 |
| 9 | Útlán | 1.110.576 | 970.605 |
| 10 | Lánsbrøv | 155.950 | 156.101 |
| 11 | Partabrøv o.a. | 21.036 | 729 |
| 11 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 0 | 15.556 |
| 11 | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 10.985 | 0 |
| 12 | Ítøkiligar ognir | 10.580 | 10.430 |
| 13 | Aðrar ognir | 4.073 | 4.648 |
| | **Ogn tilsamans** | 1.513.846 | 1.202.537 |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| 15 | Innlán | 1.219.133 | 932.098 |
| | Onnur skuld | 9.325 | 8.135 |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur | 2.741 | 2.728 |
| | **Skuld tilsamans** | 1.231.199 | 942.961 |
| | | | |
| | **Eginpeningur** | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur | 3.669 | 3.604 |
| | Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 254.972 | 237.825 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 23.006 | 17.147 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | 282.647 | 259.576 |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | 1.513.846 | 1.202.537 |
| | | | |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 79.642 | 26.647 |
| | Aðrar ábyrgdir | 6.965 | 8.167 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | 86.607 | 34.814 |

# KAPITALFLYTINGAR OG SOLVENSUPPGERÐ

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 3.604 | 3.601 |
| | Tilgongd í árinum | 103 | 83 |
| | Frágongd í árinum | 38 | 80 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | 3.669 | 3.604 |
| | | | |
| | Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 3.000 |
| | Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 3.000 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 1.000 | 1.000 |
| | **Gávugrunnur við ársenda** | 1.000 | 1.000 |
| | | | |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 254.972 | 235.825 |
| | Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | 2.000 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 23.006 | 17.147 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | 277.978 | 254.972 |
| | | | |
| | **Eginpeningur tilsamans** | 282.647 | 259.576 |
| | | | |
| | **Solvensuppgerð** | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 282.647 | 259.576 |
| | Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 282.647 | 259.576 |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 984.402 | 826.421 |
| | Vektaði tøl undir strikuni | 75.697 | 15.011 |
| | Vektaði tøl við marknaðarváða | 50.080 | 36.712 |
| | | | |
| | **Vektaði tøl tilsamans** | 1.110.179 | 878.144 |
| | | | |
| | Solvensprosent sambært BSL §21, stk. 1 | 25,5% | 29,6% |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 25,5% | 29,6% |

# PENINGASTREYMSROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Rakstur** | | |
| | Ársúrslit eftir skatt | 23.006 | 17.147 |
| | | | |
| | Broytingar viðv. upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| | Útsettur skattur | 27 | -151 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 981 | 1.069 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | -858 | 2.684 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | -13 | -53 |
| | **Íalt frá rakstri** | 23.143 | 20.696 |
| | | | |
| | **Rakstrarkapitalur** | | |
| | Útlán | -139.113 | -84.292 |
| | Innlán | 287.035 | 7.835 |
| | Aðrar ognir | 575 | -1.040 |
| | Onnur skuld | 1.190 | 166 |
| | **Íalt frá rakstrarkapitali** | 149.687 | -77.331 |
| | | | |
| | **Íløgur** | | |
| | Lánsbrøv | 151 | 17.948 |
| | Partabrøv | -20.307 | -5 |
| | Kapitalpartar | 4.571 | 40 |
| | Ítøkiligar ognir | -1.131 | -1.003 |
| | **Íalt frá íløgum** | -16.716 | 16.980 |
| | | | |
| | **Fígging** | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 65 | 3 |
| | | | |
| | Broytingar í gjaldføri | 156.179 | -39.652 |
| | Gjaldføri við ársbyrjan | 44.468 | 84.120 |
| | **Gjaldføri við ársenda** | 200.647 | 44.468 |

# VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 1.680 | 1.409 |
| | Útlán | 65.845 | 60.596 |
| | Lánsbrøv | 5.262 | 6.798 |
| | Rentuinntøkur tilsamans | 72.787 | 68.803 |
| | | | |
| 2 | Rentuútreiðslur | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 0 |
| | Innlán | 16.786 | 14.381 |
| | Ábyrgdarpeningur | 109 | 107 |
| | Rentuútreiðslur tilsamans | 16.895 | 14.488 |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan | | |
| | Lánsbrøv | -1.560 | -521 |
| | Partabrøv | 819 | 0 |
| | Gjaldoyra | 55 | 50 |
| | Virðisjavnan tilsamans | -686 | -471 |
| | | | |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | | |
| | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 384 | 366 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 443 | 306 |
| | Aðrar vanligar inntøkur tilsamans | 827 | 672 |
| | | | |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | | |
| | Løn og samsýning til nevnd | 407 | 420 |
| | Løn, eftirløn og samsýning til stjórn | 1.236 | 1.236 |
| | Løn og samsýning til umboðsráð | 81 | 68 |
| | Løn til starvsfólk | 10.989 | 9.974 |
| | Eftirløn til starvsfólk | 1.840 | 1.657 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd o.a. | 868 | 818 |
| | Starvsfólkaútreiðslur tilsamans | 15.421 | 14.173 |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 16.322 | 15.661 |
| | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans | 31.743 | 29.834 |

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 5 | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk (framhald) | 33,7 | 33,0 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar** | 456 | 455 |
| | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 0 | 0 |
| | | | |
| 6 | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 223 | 207 |
| | Maskinur og innbúgv | 758 | 862 |
| | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | 981 | 1.069 |
| | | | |
| 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 273 | 2.871 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | 273 | 2.871 |
| | | | |
| 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 69.076 | 33.213 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 99.907 | 0 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | 168.983 | 33.213 |
| | | | |
| 9 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 24.435 | 11.989 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 39.328 | 29.898 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 119.219 | 97.304 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 367.726 | 347.614 |
| | Yvir 5 ár | 559.868 | 483.800 |
| | **Útlán tilsamans** | 1.110.576 | 970.605 |
| | | | |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar** | | |
| | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 23.244 | 33.370 |
| | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | 23.244 | 33.370 |

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 9 | Akkumuleraðar burturleggingar í % av | | |
| | bruttoútlánum og ábyrgdum við ársenda (framhald) | 1,9% | 3,2% |
| | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | 31 | 3.587 |
| | | | |
| 10 | **Lánsbrøv** | | |
| | Børsskrásett | 155.950 | 156.101 |
| | | | |
| 11 | **Partabrøv** | | |
| | Skrásett á øðrum keypsskálum | 1.081 | 0 |
| | Onnur | 19.955 | 729 |
| | | | |
| | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Onnur | 0 | 15.556 |
| | | | |
| | **Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum** | | |
| | Onnur | 10.985 | 0 |

Konsern uppgerð

Konsernin umfatar Norðoya Sparikassa og Sp/f Heim

| | *Móðurfelag* | *Sp/f Heim* | *Konsern* |
|---|---|---|---|
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 60.155 | 0 | 60.155 |
| Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt | 28.656 | 560 | 28.656 |
| Ársúrslit | 23.006 | 587 | 23.006 |
| | | | |
| Ogn tilsamans | 1.513.846 | 22.505 | 1.513.846 |
| Eginpeningur | 282.647 | 10.985 | 282.647 |

| | | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarlig umsetningsogn** | | |
| | Fíggjarlig umsetningsogn ásett til marknaðarvirði | 155.950 | 156.101 |
| | Munur millum útveganarvirði av fíggjarligari umsetningsogn | | |
| | omanfyri og hægra marknaðarvirði uppgerðardagin | -395 | -701 |
| | | | |
| 12 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 10.821 | 10.821 |
| | Tilgongd | 647 | 0 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | 11.468 | 10.821 |

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | Avskrivingar við ársbyrjan (framhald) | 3.698 | 3.491 |
| | Avskrivingar í árinum | 223 | 207 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 0 |
| | Avskrivingar við ársenda | 3.921 | 3.698 |
| | | | |
| | Bókað virði við ársenda | 7.547 | 7.123 |
| | | | |
| | Ítøkiligar ognir | | |
| | Maskinur og innbúgv | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 11.519 | 10.752 |
| | Tilgongd | 488 | 1.083 |
| | Frágongd | 141 | 316 |
| | Samlaður keypsprísur við ársenda | 11.866 | 11.519 |
| | | | |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 8.212 | 7.586 |
| | Avskrivingar í árinum | 757 | 862 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 136 | 236 |
| | Avskrivingar við ársenda | 8.833 | 8.212 |
| | | | |
| | Bókað virði við ársenda | 3.033 | 3.307 |
| | | | |
| | Bókað virði við ársenda, ítøkiligar ognir tilsamans | 10.580 | 10.430 |
| | | | |
| 13 | Aðrar ognir | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 3.528 | 4.334 |
| | Aðrar ognir | 545 | 314 |
| | Aðrar ognir tilsamans | 4.073 | 4.648 |
| | | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 0 | 0 |
| | | | |
| 15 | Innlán | | |
| | Uttan uppsøgn | 475.238 | 368.005 |
| | Við uppsøgn | 525.051 | 485.001 |
| | Tíðarinnskot | 127.804 | 0 |
| | Serinnlán | 91.040 | 79.092 |
| | Innlán tilsamans | 1.219.133 | 932.098 |

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 15 | Uttan uppsøgn (framhald) | 475.238 | 368.005 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 41.707 | 30.975 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 632.289 | 471.980 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 17.125 | 15.620 |
| | Yvir 5 ár | 52.774 | 45.518 |
| | Innlán tilsamans | 1.219.133 | 932.098 |
| | | | |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur | | |
| | Treytaleys eftirlønartilsøgn | 2.646 | 2.660 |
| | Útsettur skattur | 95 | 68 |
| | Burturleggingar til útreiðslur tilsamans | 2.741 | 2.728 |
| | | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 3.604 | 3.601 |
| | Tilgongd, netto | 65 | 3 |
| | Ábyrgdarpeningur við ársenda | 3.669 | 3.604 |
| | | | |
| 18 | Tøl uttan fyri javnan | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 79.642 | 26.647 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 6.965 | 8.167 |
| | Tøl uttan fyri javnan tilsamans | 86.607 | 34.814 |
| | | | |
| 19 | Stjórn og nevnd | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans | | |
| | Stjórn | 1.227 | 1.117 |
| | Nevnd | 2.956 | 3.273 |
| | | | |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 1.090 | 1.090 |
| | Nevnd | 5.855 | 5.888 |
| | | | |
| 20 | Kredittváðar- útlán býtt í vinnugreinir í % | | |
| | Almennir myndugleikar | 0 | 1 |
| | | | |
| | Vinnur | | |
| | Fiskivinna | 8 | 10 |
| | Framleiðsluvinna o.a. | 7 | 6 |
| | Byggivinna | 3 | 3 |

| Viðm. | | 2005<br>1.000 DKK | 2004<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 20 | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna (framhald) | 8 | 6 |
| | Flutningur, postur og telefon | 2 | 2 |
| | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 6 | 5 |
| | Aðrar vinnur | 3 | 1 |
| | Vinnur tilsamans | 37 | 33 |
| | Privat | 63 | 66 |
| | Tilsamans | 100 | 100 |
| | | | |
| 21 | Marknaðarváðar | | |
| | Gjaldoyraváði | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 445 | 562 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 0 | 252 |
| | Gjaldoyraábending | 445 | 310 |
| | Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,2 | 0,1 |
| 22 | Rentuváðar | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | | |
| | alt í DKK | 5.098 | 2.548 |
| 23 | Skattur | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 5.660 | 4.906 |
| | Útsettur skattur | 26 | -151 |
| | Javnan av roknaðum skatti | -36 | -2 |
| | Tilsamans | 5.650 | 4.753 |
| | | | |
| 24 | Millumverandi við assosieraðar fyritøkur | | |
| | Sp/f Heim - eigarapartur | 0 | 50% |
| | P/f Kósin - eigarapartur | 0 | 25% |
| | Innlán | 0 | 2.002 |
| | Útlán | 0 | 31.862 |
| | | | |
| 24 | Millumverandi við tilknýttar fyritøkur,<br>ið ikki eru konsolideruð. | | |
| | Sp/f Heim | 100% | 0% |
| | Innlán | 957 | 0 |
| | Útlán | 0 | 0 |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri 2005 hjá Norðoya Sparikassa er gjørdur í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a. umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Nýtti roknskaparhátturin er tann sami, sum varð nýttur í 2004. Samanlíkningartølini fyri 2004 og 2005 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð.

## Tíðaravmarkingar

Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

## Konsernroknskapur

Norðoya Sparikassi hevur eitt dótturfelag: Sp/f Heim.
Felagið, Sp/f Heim, eigur eina fasta ogn sum verður útleigað, harumframt ger felagið kapitalíløgur.
Konsernroknskapur er ikki gjørdur, grunda á at hetta virksemið ikki er ein týðandi partur av tí samlaða konsern-virkseminum.

Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum
Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.

## Útlán og onnur áogn

Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru avsettar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivað fult út.

## Lánsbrøv, partabrøv og kapitalpartar

Goymsla sparikassans av børsskrásettum lánsbrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2005.

Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið eru óskrásett, er í mesta lagi sett til keypsvirðið.

Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tiknir upp til innara roknskaparliga virðið við ársenda 2005.

## Fastar ognir

Fastar ognir eru virðissettar til keypsvirðið við ískoyti av ábøtum og við frádrátti av avskrivingum.

Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár, meðan ognir, ið sparikassin hevur yvirtikið í samband við uppgerð av millumverandi, og sum skulu seljast, verða avskrivaðar við støði í árligum innanhýsis metingum av ognunum.

### Maskinur og innbúgv

Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

### Fremmant gjaldoyra

Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

### Innlán og onnur skuld

Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

### Skattur

Skattur av ársinntøkuni og broytingar í útsettum skatti er útreiðsluført.